LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði,ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

GÓÐ PÍKADEKK
á Volvo felgum, 185-14, til sølu.
Tlf. 220779

TIL SØLU
Nýsýnaður Subaru GL 1,8, í hampuligum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 233242

TIL SØLU
Nýsýnaður Opel Corsa 1,2, árg. 89, bíliga til sølu.
Tlf. 252976

PEUGEOT 205
árg. 84, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 422390

TIL SØLU
Tveir Toyota Corolla, árg. 85-86, til sølu. Ymiskir eykalutir fylgja við.
Tlf. 218091

MAZDA 323
frá seinast í 80-unum, koyrir væl og er nýsýnaður, bíliga til sølu. Tlf. 451295

VW PASSAT
st.car, turbodiesel, árg. 94 til sølu.
Tlf. 456422

YNSKIST
Eykalutir til Mitsubishi Galant 1,8 TD, árg. 89, ynskjast. T.d. toppstykki ella heilur bilur at brúka sum eykalutir.
Tlf. 442359 ella 21971

HYGG HER!
Golf II diesel, árg, 87, koyrt 200.000 km í Týsklandi, reyður, nýsýnaður, nýlakeraður, sportsfelgur. Sær gott út. Boð undir 42.000 ongan áhuga.
Tlf. 313171 - 210404

TIL SØLU
Nissan Patrol, árg. 87, koyrt 164.000 km, sær gott út, júst verið til sýn, fekk ongan kross, til sølu um hóskandi boð fæst. Tlf. 281886, e. kl. 15

MAZDA 323
Typa BF, árg. 1985 til sølu. Koyrir væl, men krevur ábøtur til sýn.
Tlf. 217255

PEUGEOT 305 GRD
st. car diesel, árg. 85, til sølu fyri 7.000 kr. sýnaður 03/2000, 1-ára gomul píkadekk fylgja við.
Tlf. 448787 eftir kl. 18

MAZDA 323
árg. 11/96 til sølu.
Tlf. 448423 ella 220949

FIRESTONE
Fýra píkadekk, lítið slitin, til søluyri 1.000 kr. Stødd 195/65/15.
Tlf. 315052
ella 218888

CITROEN BX 16
árg. 90 til sølu við sýnsseðli fyri 3.000 kr.
Tlf. 211376 ella 212173

DIESEL BILAR
BMW 524 TD árg. 91 Mercedes V 300 TD, árg. 91 VW Golf III 1.9 TD, árg. 92 VW Golf III, 1.9 TD, árg. 93 Sp/f Autoimport bilsøla lakk-plátu verkstaður eykalutir.
Tlf. 421560

PEUGEOT 309GR
árg. 87, sýnaður í juni 2000, selist fyri 3.500,- kr.
Tlf. 422364

FORD TRANSIT
turbodiesel 2.5, útgjørdur sum avlamisbilur við lyftu. Koyrt 7.000 km, árg. 96, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 223311

MAZDA 626 GLX H/B
árg. 85, í hampuligum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 223527

FORD FIESTA
árg. 89, til sølu fyri 6.000 kr. Sýnaður í juni 2000.
Tlf. 316584

TOYOTA HILUX
Tvey hjóls trektur, við trælast, nýsýnaður, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 320266 eftir kl. 18

HURÐ TIL MAZDA
Er tað nakar ið hevur eina hurð ið passar til ein Mazda 323 Sedan? Mær tørvar eina hurð til vinstru megin aftan. Vinarliga ringið
Tlf. 448261

MAZDA 323
1.6 GTI, árg. 86, neyðugt er við gearkassaskift, annars er bilurin í góðum standi og bíliga til sølu.
Tlf. 371268 ella 221897

NISSAN SUNNY 1600
SGX coupe til sølu. Hevur el-rútar, el-spegil og sóltak, koyrir ikki, men hevur deilin, ið skal nýtast til bilin, árg. 1988.
Tlf. 373880

OPEL KADETT 1.3 LS
til sølu. Er sýnaður í juli, aut. gear, koyrir væl, árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 316085 ella 217240

SPORTSFELGUR
stødd 15" við dekkum, prísur 2.000 kr.
Tlf. 221281

17" SPORTFELGUR
Nú er seinasti møguleiki at ogna sær tær flottu 17" sportfelgurnar við dekkum, spildurnýggjar M-3, best til BMW og aðrar nýggjar bilar.
Ring 211372 ella 253248

KING CAB 4x4
Um hóskandi fæst, er jeepur við last til sølu. Bilurin hevur koyrt 188.000 km. Hann er sera væl egnaður til bónda- og stampakoyring, hevur CD og sportsfelgur
Tlf. 222850

FIAT FIORINO VAN
»kassabilur« 1.7 diesel, bilurin er frá 92/93, koyrt í Týsklandi í nøkur ár, koyrt 125.000 km, hevur píkadekk.
Tlf. 220744

GOLF VR6
2.8i, 174 HK til sølu fyri 120.000 kr.
Tlf. 320181

TIL SØLU
Suzuki Swift AA árg. 88, til sølu.
Tlf. 451023 ella 222040

YNSKIST
Motorur til ein Nissan Cherry 1300 ynskist til keyps.
Tlf. 444627

FORD ESCORT SPORT
til sølu. Bilurin hevur elrútar, elspegl, varma í setrinum og í forrútinum. Hevur 15" sport felgur og felgur við góðum píkadekkum. Hann er sera væl viðfarin.
Tlf. 447220

OPEL KADET
til sølu sum eykalutir vegna tardan botn. Mekaniskt í góðum standi.
Tlf. 315318 - 253318

FORD ESCORT
Ford Escort diesel til sølu.
Tlf. 218540

FORD COURIER
Ford Courier Diesel til sølu.
Tlf. 218540

SPORTSFELGUR
15" sportsfelgur, 4 hol, við góðum dekkum, til sølu fyri 3000 kr. Píkadekk á felgum til Volvo bíliga til sølu (sum nýggj).
Tlf. 222220

FORD P100
diesel Hardtop, nýsýnaður, árg. 1991, til sølu.
Tlf. 441888

TIL SØLU
Tvey góð 15" heilársdekk fyri 250 kr. stk. og fýra stk. 15" hjólskálir til Peugeot fyri 150 kr. stk.
Tlf. 314161

VOLVO 245
st.car árg. 1984 til sølu fyri 8.500 kr.
Tlf. 216620

MAZDA 626
árg. 1984 til sølu, krevur ábøtur sum sveisa skermin innan høgrumegin og varmaapparat, koyrir gott, nógvir deilir fylgja við, søluprísur 3.-3.500 kr.
Tlf. 222446

TIL SØLU
Tveir Nissan bluebird 2,0 t12. Annar kann koyra (hevur skaða) nýsýnaður,hevur automatisk gear,el rútar, spildurnýggj píkadekk. Tveir nýggir stødemparar ,1 nýggj vinstra hurð aftan fylgja við. Prísuppskot 5.000 kr.
Tlf 212036

FORD ESCORT VAN YNSKIST
Ein Ford Escort 1.4 Van kassabilur ynskist til keyps sum eykalutir, um nakar eigur ein, so vinarliga ring tlf. 424283 ella 214283

VW PASSAT
árg. 87 í góðum standi til sølu. Tlf. 252502 eftir kl. 16

FORD SIERRA
árg. 90, sær gott út, hevur sportsfelgur, vel og spoylarar. 130.000 km, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 441405

MAZDA 626 GLX HB
árg. 85, krevur smærri ábøtur, uttan plátur til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 254396

MITSUBISHI GALANT 1.8 TD
árg. 90, sýnaður des. 2000, í sera góðum standi, til sølu fyri 48.000 kr.
Tlf. 315982 ella 282246

CITROEN BX 16
árg. 90, til sølu, góður motorur, heilt lítið rustaður. Krevur sbrt. sýni ábøtur fyri uml. 15.000 kr.
Tlf. 318269 ella 212173

FIAT SEICENTO 1.1
Fiat Seicento 1.1 Sport árg. 98, koyrt 17.000 km, heilársdekk fylgja við í keypinum. Nærri fæst at vita á tlf. 316490 eftir kl. 18.00

FORD SIERRA
Nýsýnaður Ford Sierra árg. 87 til sølu.
Tlf. 221365

SUZUKI GS 550
árg. 78 til sølu.
Tlf. 221365

NISSAN KINGKAB
2,5 turbo diesel, árg. 1995, til sølu.
Tlf. 332295 ella 212395

NISSAN PATROL
árg. 85, nýsýnaður til sølu.
Tlf 281032

YNSKIST
Fýra 14" píkadekk ynskjast til keyps.
Tlf. 221347

TIL SØLU
Fýra lítið brúkt Gislaved Nord Frost píkadekk, 165-80-13, til sølu.
Tlf. 221347

FIAT UNO
60 N, til sølu.
Tlf. 313784

TOYOTA HILUX 2 4D
til sølu, toppstykkið er brotið.
Tlf. 441238

EYKALUTIR TIL
Toyota Carina ST 171, árg. 88-91. Hurðar, bakrútur, síðurútur, startari, el rútavindara, drívaksil, tendring og spegl - H.
Tlf. 455843

OPEL ASCONA 1,6
Árg. 87, við skaða, verður seldur heilt bíliga. Kom og síggj. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 375055

Amboð

BLANDIMASKINA
ynskist til keyps.
Tlf. 217755 ella 311595

KOMBINERAÐ
snikkaramaskina, lítið brúkt, til sølu vegna plásstrot.
Tlf. 216260, 316260
ella 372829

TIL SØLU
Brúktur dreygibonkur til sølu. Dreygilongd 100 cm, pinolhædd 22 cm. Tilhoyr: fýrklógv og brilla.
Tlf. 312467 ella 212467

SVEISIAPPARAT
Eitt 180 amp. sveisiapparat til elektrodu- & TIG sveising.
Tlf. 210181

GAFFILTRUKKUR TIL SØLU
Brúktur el-trukkur við løðara 80 volt, 3,5 t. Áhugað kunnu ringja 254396

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
22 ára gomul genta søkir arbeiði í Havn eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga. Havið royndir við børnum.
Tlf. 253224 eftir kl. 16

FRISØR
Dámar tær væl at seta hár og leggja make up, so er hetta nakað fyri teg. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 316515 ella 311683 millum kl. 12-13 og aftaná kl. 19.00

TIMBURARBEIÐI
Alt timburarbeiði verður gjørt skjótt og væl.
Sámal A. Hansen byggimeistari
tlf. 286188, 444688 ella 315237

FA. HÚSAUMVÆLING:
TIMBURARBEIDI
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

KIOSKIN Í HB-HÚSINUM
Søkt verður eftir fólki at reka kioskina í HB-húsinum. Áhugað kunnu seta seg í samband við Jan á tlf. 219555 ella senda eina umsókn til HB, Gundadalur, 100 Tórshavn

Barnaansing

SØKT VERÐUR EFTIR
gentu/kvinnu at ansa eftir 11 mør. Barbu, frá 1.2. kl. 07.30-15.00.
Tlf. 315842, Lis

SØKT VERÐUR
eftir kvinnu at ansa eftir 1/2 ára gamla Tummasi frá 1. februar 2001. Arbeisðtíð frá kl. 8-16.00.
Tlf. 320265

SØKT VERÐUR
eftir kvinnu at ansa eftir 1 ára gomlu Guðrun frá 1. februar til 1. august 2001. Væntast kann, at ansingartíðirnar verða skiftandi. Áhugaðar kunnu ringja á
tlf. 314061

Í KEYPMANNAHAVN
fyrst í komandi ári til juli. Vit søkja eftir eini gentu/konu til at ansa eftir lítla Tóri 30 tímar um vikuna. Lønin er sambart avtalu við Københavns Kommune. Ert tú áhugað ella kennur tú onkran sum kundi havt áhuga so kunna tit ringja til okkum á tlf. 38 34 33 99

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
se undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

Barnaútgerð

YNSKIST
Barnavognur ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 321988

BARNAVOGNUR
Myrkabláur Combi-barnavognur (Brio) til sølu.
Tlf. 222173 eftir kl. 17

YNSKIST
Baby lurtitól ynskist til keyps.
Ring 312601 ella 220276

KOELSTRA KOYRISTÓLUR
við galesju til sølu, er myrkabláur við smáum blomstrum í galesjuni.
Tlf. 253354

KOYRISTÓLUR
Koyristólur til sølu fyri 800,- kr.
Tlf. 253354

TIL SØLU
Ein grá leðurlook babylyft til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 448251

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkagráur »Odder« barnavognur við stálkassa til sølu fyri uml. 1/2 prís. Brúktur í 1 ár. Sera vælhildin. Sjáldsamt skap. Regnslag, setur, lift o.a. fylgja við.
Tlf. 424070

TIL SØLU
Chicco bilbarnastólur, upp til 13 kg., 200 kr. Trip-trap líknandi stólur 300 kr. Pusliborð við baðikar 200 kr.
Tlf. 321715

BILSTÓLUR
»Britax« bilstólur 0-13 kg. farva: Jungle blue, við fylgir púta at stuðla høvdið og »topsit« dýnuyvirtrekk við hettu, so barnið situr heitt og fjálgt. Samlaður prísur: 800,- kr.
Tlf. 281212

PUSLITASKA
Myrkablá Símo puslitaska til sølu fyri 300,- kr. aldrin brúkt.
Tlf. 281212

YMIST TIL SØLU
1 leðurlook grá babylift 200 kr. 1 grulvigarður 300 kr. 1 stativ v/ baðikar 300 kr. 1 skrástólur 100 kr.
Tlf. 448535

TREMMUSONG YNSKIST
Bílig tremmusong ynskist til keyps, skal helst vera í rímuliga góðum standi.
Tlf. 321617

SCANDIA KLAPPSTÓLUR
Nýggjur og óbrúktur svartur Scandia klappstólur til sølu. Setrið kann vendast, er vind og vatntættur. Kann innstilla haldið og hevur luft gummihjól, kann nýtast sum kombivognur.
Tlf. 449260

BRIO BARNAVOGNUR
Sera væl viðfarin Brio barnavognur við tilhoyrandi lift, dýnu og fluguneti, myrkabláur við ternutum mynstri, til sølu fyri 2.800,- kr.
Tlf. 312056

YNSKIST
Koyristólur við kalesju í góðum standi ynskist.
Tlf. 320325

Bátaútgerð

KONTROLPANEL YNSKIST
Eigur nakar eitt kontrolpðanel til ein Sabb Mitsu biski motor - M4 - 140 gr at selja mær.
Tlf. 313464

TIL SØLU
3 automatiskar vágasnellur til sølu.
Tlf. 371877

MOTORUR
Volvo Penta uml. 25 HK ynskist til keyps. Aðrir motorar í somu stødd hava eisini okkara áhuga.
Tlf. 455161 og 455213

MOTORUR
Perkins TD 140 HK til sølu um hóskandi boð fæst. Kann roynast í báti nakrar dagar afturat.
Tlf. 317511

BJARGINGAR-SLØKKIÚTGERÐ
Vestar, kransar, rakettir, blúss, slangur o.a.
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

LÍNA TIL SØLU
Nakrir stampar av 4 mm línu og ein Atlas VHF-ur.
Tlf. 332698 ella 251841

SKJÓTTGANGANDI GLASTREVJABÁTUR
v/ 2 1/2 ára gomlum motori og við nógvari elektroniskari útgerð til sølu fyri 290.000 kr. ella hægsta boð yvir.
Tlf. 00452069519

ROYN VÁRRÓÐURIN
Fiskiloyvið 4A til sølu.
Tlf. 441760

BÁTAMOTORUR
165 HK Volvo Penta bátamotorur við drev, í góðum standi, einans koyrt ca. 1500 tímar, verður seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 213666

BJARGINGARÚTGERÐ
Vestar, kransar, rakettir, bluss, sløkkiútgerð.
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

EKKOLOD – GPS
1 stk. ekkolod Eagle Supra I.D. Prísuppskot: kr. 2.500,- Garmin GPS 45 (berbarur) og monterast, prísuppskot: kr. 3.000,-
Tlf. 287904 ella 214304

TIL SØLU
5 stk. BJ 5 el-snellur bíliga til sølu.
Tlf. 373302 - 214302

4-MANNAFAR
4-mannafar ella annar bátur um somu stødd, úr glastrevju, uttan motor, ynskist til keyps.
Tlf. 333325

Bingo

GOTT BINGO
verður í Samkomuhúsinum í Sumba sunnudagin 28. jan. kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar.
5. fl., Sumba, Leiti og Vági

BINGO
verður í Havnar klubba mánakvøldið 29. januar kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar, koyring heim aftaná.
Astma/Allergifelagið

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 28.1. kl. 16. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1000 kr. eykaspælið 1200 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

KAGGIN!
Gott bingo verður leygarkvøldið 27.1. kl. 19.00. 15 vinningar á lutaseðli, m.a. 2 gávukort á 1.000 kr. Eisini verður eykaspæl.
Kaggin

GOTT BINGO
verður í Framtíðini ónskvøldið 31.1. kl. 19.30.
Vágs Svimjifelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini mánakvøldið 29. januar kl. 19.30. Annaðhvørt bingo gávukort á 1/2 krov og annaðhvørt gávukort á kr. 300.
Kirkjukórið Ljómurt

Bøkur

ALFRØÐI 1 OG 2
Er tað nakar, ið kann selja mær bøkurnar Alfrøði 1 og 2?
Tlf. 315385

NÓGVAR BØKUR
Frilesnaður, søga og romanir. Alt bíliga.
Tlf. 311915 og 220660

Burturm. /funnið

LYKLATYSSI
við trimum lyklum og reyðum plastspjaldri funnið ovarlaga í N. Finsensgøtu.
Tlf. 219191

BARNATASKA
við svimjiklæðum er gloymd í tógvhandlinum Hespan í des. mør.
Sp/f Hespan tlf. 318737

GULLRINGUR
(vígsluringur) við navnaplátu á, har 3 bókstavir eru inngraveraðir funnin við Vegin Langa.
Tlf. 311243

GLOYMDAR BRILLUR
Einar brillur gloymdar í gula bókahandli áðrenn jól.
P/f Hjalmar Jacobsens Bókahandil
Tlf. 311584

ER TAÐ NAKAR
sum av misgávum umborð á Trónda fyri ca. 14 døgum síðani hevur tikið ein beriposa við eini hvítari blusu, cowboybuksum og einum skóm. Gerið so væl at ringja tlf. 361366

LYKLATYSSI BURTURMIST
á vegastrekkinum Traðargøta 12-47 og Traðartún 7. Í lyklatyssinum eru billykil - 2 reyðir Rukolyklar, 1 grønur og 2 gráir.
Vinarliga ringið 312292

HEVUR NAKAR
funnið mína mappu, mist í SMS 22. des. koyrikort og onnur pappír í. Vinarliga ring tlf. 333038 ella 223084

HARRAUR
burturmist í Klaksvík 16. des. Finningarløn verður givin.
Tlf. 457258

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í høvuðsstaðarøkinum ella nærhendis. Má hava 2-3 kømur. Vit fara væl um.
Tlf. 283812

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn ella nærhendis til tvey vaksin og eitt barn. Skal hava 2-3 sovirúm.
Tlf. 216151
ella 316716

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Tórshavn.
Tlf. 217155

TIL LEIGU
60 fermetrar stórt, ljóst kjallarahøli við egnari inngongd til leigu. Nærhendis býnum.
Tlf. 220384

HÚS Á EIÐI TIL SØLU
um hóskandi boð fæst.
Tlf. 423361
eftir kl. 18

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
Íbúð til leigu í Havn frá 1. mars, uml. 80 kvm. stova, køkur, 2 verilsir wc/brúsa, kr. 4.000 um mør. við el og hita. Dep. 1 mør. Skriva til: Sosialurin Box 76, 110 Tórshavn Bill.mrk. 378

HÚS YNSKJAST
til leigu í Havn ella nærhendis Havnini sum skjótast.
Tlf 004524873787

ÍBÚÐ YNSKIST
40 ára gomul kvinna við 6 ára gomlum soni ynskir góða íbúð í Tórshavn.
Tlf. 252610

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Friðaligt par, fara væl um og gjalda til tíðina, max 5.000 kr. frá 1.2.
Tlf. 253093

ÍBÚÐ Í HAVN
Eg ynski íbúð í Havn til leigu sum skjótast.
Tlf. 373850

HÚS Í FUGLAFIRÐI
til sølu ella leigu, sera barnavinarligt umhvørvi.
Tlf. 444012 ella 281644

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par, sum ynskja íbúð í høvuðsstaðarøkinum skjótast gjørligt. Hava fast arbeiði og fara væl um.
Tlf. 222550 ella 214163

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par, ið ynskja íbúð í Havn/Argir, skjótast tilber. Fara væl um, gjalda til tíðina.
Tlf. 441695 ella 252602

SØKIST
Ungt par mitt í 20-unum søkir eftir íbúð skjótast. Bæði hava fast starv. Eru friðarlig og fara væl um.
Tlf. 243324

ÍBÚÐ
Eg eri ein mamma við einari 8 ára gamlari diddu. Vit ynskja eina íbúð ella eini lítil hús skjótast. Vit eru friðaligar og fara væl um.
Tlf. 310383

HÚS Í VÁGI
Um nóg høgt boð fæst, selji eg hús mítt í Lágabø.
Tlf. 373874 ella 289174

MAMMA
við trimum børnum søkir íbúð á Argjum. Skriva til: Sosialurin Box 76 110 Tórshavn Bill.mrk. 0169

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður ynskir íbúð 1. apríl 2001 í Tórshavn. Vinarliga ring 316490 ella 253079, Gert

ÍBÚÐ YNSKIST
í Havn ella nærhendis til tvey vaksin og eitt barn, má hava 2-3 kømur.
Tlf. 216151 ella 316716

ÍBÚÐ
Eg og familjan søkja íbúð/hús til leigu í Klaksvík. (Tvey vaksin og eitt barn).
John William Joensen Tlf. 455914 (heima) tlf. 457204 (arbeiði) 252587 (mobil)

HJÁLP!!!
Vit eru eitt ungt par, ið søknast eftir eini íbúð í Havn fyri max 4.000 kr. um mør. við ljós og hita. Eru friðarlig, hava fast starv og gjalda til tíðina.
Tlf. 251287

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par í 20-unum ið søknast eftir eini íbúð í høvuðsstaðarøkinum fyri max 4.000 kr. um mør. við ljós og hita. Vit hava bæði fast starv, fara væl um og eru friðarlig.
Tlf. 321026

HJÁLP – HJÁLP
Vit eru eitt par við tveimum børnum, sum eru uppsødd til 1. feb. Vit ynskja at leiga lela at keypa hús í Klaksvík – kanst tú hjálpa?
Tlf. 457159 ella 220603

ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum søkja íbúð ella hús í Kollafirði, Leynum, Kvívík ella Hósvík sum skjótast.
Tlf. 283141 ella 421178

HAVA TYGUM
ein kjallara í Havn, sum eg kann innrætta til íbúð fyri síðan at leiga fyri eina tíð, saman við konu míni og okkara trimum børnum. Vinarliga ring: tlf. 318758, 221656, Anton Petur

ÍBÚÐ YNSKIST Á TOFTUM
ella nærhendis skjótast gjørligt til ein 25 ára gamlan mann, farið væl um havi fast starv.
Tlf. 252943

KAMAR/ÍBÚÐ Í LONDON
Eg søknist eftir bústaði í London frá fyrst í februar til hálvan apríl. Vinarliga rint tlf. 317130

KAMAR ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu, helst í eysturbýnum. Vinarliga ringið á
tlf. 220910 eftir kl. 16.00

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu frá 1. feb. 2001 til kvinnu fyrst í 40-unum.
Tlf. 254460

STÓRT VERILSI
til leigu v/ øllum hentleikum v/ atgongd til køk, bað, mynttelefon og vaskimaskinu. Leigari má ikki royka. 5 min. gongd til Lærarastúlan.
Tlf. 313799

HÚS TIL LEIGU
Hús í Havn til leigu beinanvegin fyri 6.000 kr. um mør. u/ ljós og hita. Húsini eru 120 fermetrar og standa í friðarligum umhvørvi.
Tlf. 321166 - 250883 - 250884

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197 Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo

Dansur

GRÝLUDANSUR
Stóri árligi grýludansurin við Hjarnar verður á Kambsdali leygarkvøldið 24.2.
Kom og dansa

Dýr

TIL SØLU
Tveir tarvskálvar, 1 og 3 vikur gamlir, til sølu.
Tlf. 218101

HUNDAHVØLPUR
ynskist. Helst av sera lítlum slagi.
Tlf. 215654

SERA FITTUR
flekkutur kettlingur (ketta) hevur tumlar, verður latin djóravini, er reinlig.
Tlf. 252270 í Havn

SEYÐAHUNDAHVØLPAR
av slagnum Border Collie til sølu.
Tlf. 311174 ella 211174

HAMSTRARABÚR
í trimum hæddum til sølu fyri 350,- kr. Tlf. 253354

UNDULÁTAR TIL SØLU
fyri 200 kr. stk.
Ringið 448043

HUNDAHVØLPAR
2 hundahvølpar latast til djóravinir, undan lítlari friðaligari tík.
Tlf. 457413

SEYÐAHUNDUR
Ein border collie seyðahundur, 1 1/2 ára gamal, fæst við at koma eftir honum.
Tlf. 422312

YNSKIST
5-6 ungar hønur ynskjast.
Tlf. 311243

ALBINO HANN KANIN
verður latin djóravini. Búr kann fylgja við.
Tlf. 315792

KETTLINGAR
Tveir reinligir kettlingar (kettir) fáast við at avheinta, teir eru lagdir 12. okt. Mamman er hálv angora.
Tlf. 422497

KETTLINGUR
Fæst beinanvegin. Fitt og reinlig. Hon er fødd 04.11.2000.
Tlf. 313492/222131

KETTLINGAR
Kettlingar vera latnir djóravinum.
Tlf. 457654 ella 217430

KETTLINGUR
Ein sera fittur kettlingur, trílittur, 8 vikur, kann fáast.
Tlf. 214884

SKJALDBØKUR
Eg søknist eftir tveimum lítlum skjaldbøkum, evt. í umbýti við tvær størri skjaldbøkur.
Tlf. 316099 ella 212491

SKJALDBØKA
Skjaldbøka til sølu.
Tlf. 457565

HUNDAHVØLPAR
Hey! Hvør vil eiga okkum? Vit eru fýra fittir hundahvølpar.par av colli slagnum. Verða latnir til djóravin. Tygum frætta nærri við at ringja á tlf. 424277

Fundir

FRÁ EYDNUNI
Rætting til lýsta aðalfundin. Rætta dato er 31.1. kl. 20.00.
Eydnan

PENSIONISTAFELAGIÐ
í Tórshavn kemur saman í Losjuni Tinghúsvegur 18, mikukvøldið kl. 19.00.
Nevndin

HAGASTEVNA
Lýst verður til hagastevnu fyri Ytra Part í Skálafjalli, í skúlanum í Skálafirði, mánakvøldið hin 29-01-2001 kl. 19.00. At umræða:
Innkomin mál og annað.
Hagastýrið

Húsarhaldstól

YNSKIST
Sentrifuga ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 210336

Innbúgv

KØKUR
So gott sum nýggjur Invita-køkur, 230-240 cm. við øllum til sølu við ella uttan hvítvørur.
Nærri á tlf. 333414 ella 213414